# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Í valstríðnum skulu øll føra seg fram við virðing fyri hvør øðrum, og tað skulu vit eisini gera*

*(John McCain)*

# Republikanararnir misnøgdir við valstríðið hjá McCain

**Nú bara tríggjar vikur undan forsetavalinum í USA er John McCain langt aftan fyri Barrack Obama, og tað hevur elvt til ófrið og misnøgd í republikanska flokkinum**



*John McCain. Hansara republikonsku floksfelagar eru misnøgdir við valstríð hansara (Mynd: Polfoto)*

Hóast John McCain og Sarah Palin hava brúkt munandi hvassari orðaval teir seinastu dagarnar, benda meiningakanningarnar á, at tað hevur ikki gjørt nakran mun, tí Barrack Obama er framvegis umleið seks prosentstig frammanfyrii.

Tað hóvar ikki floksfeløgunum hjá McCain, og fleiri av teimum fremstu republikonsku politikarunum halda, at McCain er ikki nóg greiður. Eitt nú hevur hann havt fleiri uppskot um, hvussu fíggjarkreppan í USA skal loysast.

Fyri einari viku síðani valdu McCain og Palin er leggja á annan bógv við at herða tey persónligu álopini hjá Barrack Obama. Eitt nú bleiv hann settur í samband við yvirgangsmenn. Men tað vísti seg, at sjálvt fleiri av teimum republikonsku veljarunum vendu sær ímóti teirri nýggju kósini, og McCain noyddist at verja Obama.

Mikudagin hittast Mc Cain og Obama í tí seinasta sjónvarpsdystinum undan valinum. Tær báðar fyrru vann Obama, og nýggjar meiningakanningar vísa, at hann dregur longri og longri frá Mc Cain. Samstundis hava fleiri republikanskir viðmerkjarar funnist at McCain og valstríði hansara. Teir vilja millum annað vera við, at hann dugir ikki nóg væl at bera veljarunum boðskapin hjá republikanarunum. Aðrir siga, at McCain hevur fleiri góð uppskot, men at hann noyðist at velja nøkur burturúr og at sannføra veljararnar um tey heldur enn at vevjast uppi í øllum.

## Ov seint

John C. Danforth, fyrrverandi republikanskur senatorur í statinum Missouri, sigur við amerikanskar fjølmiðlar, at John McCai9n má greiða veljarunum frá, hvør munur er á búskaparpolitikkinum hjá sær og búskaparpolitikkinum hjá Barrack Obama.

- Men tað er kanska heldur ikki nóg mikið. Tað tykist, sum at alt í hesum valstríðnum, sum kundi gagnað McCain, hevur gingið honum ímóti, sigur fyrrverandi senatorurin og sipar til fíggjarkreppuna í USA og aðrastaðni.

# Eiga at leypa á Iran áðrenn Bush fer frá

**Leiðandi persónar í Ísrael vilja hava Ísrael og USA at leypa á Iran, áðrenn George W. Bush fer úr Hvítu Húsunum**

Tað skrivaði fryrrverandi bretski uttanríkisráðharrin David Owen í einari grein í blaðnum The Sundey Times í gjár. Sambært Owen vænta viðkomandi persónar í Ísrael ikki, at USA verður líkað hugað fyri einum álopi á Iran, tá Barrack Obama ella John McCain tekur við forsetaembætinum tann 20. januar. Tí má tað gerast, áðrenn Bush fer frá.

Ísrael og USA siga seg bera ótta fyri, at Iran ætlar sær at gera kjarnorkuvápn. Í mai skrivaði bretska blaðið The Guardian, at Ísrael hevðii biðið USA um loyvi til at bumba eitt kjarnorkuverk í Iran., men at Bush var ímóti, tí hann stúrdi fyri hevndarálopum á amerikonsk mál. Tað ljóðaði, at tað var týski kanslarin, Angela Merkel, sum hevði borið tíðindini um ísraelska fyrispurningin.

David Owen skrivar í greinini, at verður Iran álopið, kann landið svara við at steingja Hormuz-sundið. Í august segði ovastin í iransku tjóðarhirðini, Mohammad Ali Jafar, at landið hevði roynt eina rakett, sum serliga var ætlað til nýtslu á sjónum, og sum bar í sær, at einki skip kann kenna seg trygt. Hann ávaraði samstundis sum, at Iran er ført fyri at steingja Hormuzsundið, um landið verður álopið. David Owen vísir á, at eitt tílíkt stig hevði fingið sera álvarssamar avleiðingar, tí tangaskip, sum sigla við olju úr Persaflógvanum, noyðast at sigla ígjøgnum Hormuz-sundið.

Sjálvur mælir fyrrverandi uttanríkisráðharrin amerikonsku stjórnini til at ávara Ísrael, og hann heldur, at USA eigur beinleiðis at forða Ísrael í at gera álvara av hóttanini um at bumba mál í Iran. Herumframt mælir hann Bush til at senda Condoleezzu Rice, uttanríkisráðharra, til Teheran.



*Mynd frá amerikanskari hernaðarvenjing í Persaflógvanum fyri tveimum árum síðani (Mynd: AP)*

## STUTT SAGT

### Haider koyrdi skjótt

Kanningar hjá løgregluni í Eysturríki vísa, at politikarin Jørg Haider hevði nógva ferð, tá bilur hansara fór út av vegnum tíðliga leygarmorgunin. Haider, sum var einsamallur í bilinum, fekk stóran skaða í høvdið og bringuna og doyði stutt eftir.

Ein talsmaður fyri løgregluna sigur við CNN, at Haider hevði júst yvirhálað ein bil, tá ein annar bilur kom út fyri hann. Úrslitið var, at Haider misti tamarhaldið á bili sínum og fór útav. Ein kvinna, sum var í bilinum, sum Haider yvirhálaði, boðaði løgregluni frá vanlukkuni.

Eysturríkska løgreglan vil ikki koma við nøkrum gitingum um vanlukkuna, men sigur tó, at tað tykist greitt, at Jørg Haider koyrdi skjótt, tá vanlukkan hendi. Fleiri hava gitt, at tað vóru kanska politiskir mótstøðumenn, sum løgdu vanlukkiuna til rættis, men tað avsannar løgreglan.

Jørg Haider, sum bleiv 58, var á veg í 90 ára føðingardag hjá mammu síni, tá vanlukkan hendi. Eftir hann sita kona og tvey børn.

### Dýr ferð

Gjáramorgunin bleiv eitt russiskt Soyuz-rúmdarfar skotið út í rúmdina frá einari rúmdarstøð í Kasakhstan við kós ímóti altjóða rúmdarstøðini. Umborð á farinum eru ein russari og tveir amerikanarar.

Annar av amerikanarunum er ikki ein vanligur rúmdarmaður, men ríkmaðurin Richard Garriott, sum hevur goldið 30 milliónir dollarar fyri at sleppa eina ferð út í rúmdina.

Russiska rúmdarfarið verður knýtt at altjóða rúmdarstøðini í morgin. Steðgurin hjá Richard Garriott á støðini verður tíggju dagar, og hann hevur sagt, at hann ætlar sær at brúka ein stóran part av tíðiuni til at taka myndir av jørðini.

Tá Richard Garriott kemur aftur á jørðina, verður tað saman við russiska rúmdarmanninum Juri Volkov. Eitt sindur sermerkt er tað, at hann er sonur ein fyrrverandi russiskan rúmdarmann.